# Hátíðarhald úti í Grøv

**Mánadagin var eitt lítið hátíðarhald hildið í viðarlundini úti í Grøv. Hetta var í samband við, at næmingarnir á Tekniska Skúla handaðu borgarstjóranum eina brúgv, sum tey gjøgnum farna hálva árið hava latið úr hondum**

HÁTÍÐARHALD
*Orð og myndir:*
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík:** Veðrið var av tí allar fagrasta, tá hátíðarhaldið fór fram. Sólin sendi heitar geislar bæði oman og niðan, og rættiligur summardámur var yvir fólkunum, sum vóru til staðar. Børn hoppaðu av steini til stein í ánni, meðan tey vaksnu hugnaðu sær við sjálvtøkuborðinum, ið Jákup Ziskason hevði lagt til rættis á bønum.



*HT-3 flokkurin á Tekniska Skúla í Klaksvík hevur farna hálva árið smíða nýggju brúnna*

## Viðarlundin vøkur aftur

Allir norðoyingar munnu minnast grimdarregni 18. septembur seinasta ár, sum oyðilegði ein stóran part av viðarlundini úti í Grøv.

Gamlir menn vita at siga frá, at ongantíð áður hevur so nógv vatn staðið í ánni, og hetta førdi eisini við sær, at ein stórur partur av áarbakkanum hvarv í øllum regninum. Eisini niðara brúgvin fekk stóran skaða, samstundis sum gøturnar í viðarlundini fingu smávegis snuddir.

Men býráðið setti beinanvegin eftir hendingina pening til síðis, sum skuldi verða nýttir til at fríðka um viðarlundina aftur, og farna hálva árið hevur býargartnarin saman við hansara fólkum gjørt eitt megnar arbeiði úti í Grøv.

Áarbakkin er laðaður upp av nýggjum, gøturnar eru asfalteraðar og plantur av ymsum slag eru settar niður framvið ánni.

Harafturat hava næmingarnir á Tekniska Skúlanum smíðað eina nýggja brúgv, og varð hon handað borgarstjóranum hendan dagin.

## Sjálvtøkuborð í Móður Náttúru

Hans Hjalti Skaale, býargartnari í Klaksvík, helt eina lítla røðu um alt arbeiðið, sum lagt hevur verið í viðarlundina seinasta árið. Og eingin ivi skal verða um, at hann, saman við hansara fólki, hevur gjørt eitt megnar arbeiði. Viðarlundin er nú so vøkur sum ongantíð fyrr, og kom hon eisini rættiliga til sín rætt hendan góðveðursdag.

Síðan segði Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, nøkur orð, har hann eisini takkaði næmingunum á Tekiska Skúla fyri teirra leiklut í hesum sambandi.

Næmingarnir fingu í november mánaða til uppgávu at smíðað eina nýggja brúgv yvir um ánna, eftir at tann gamla varð oyðiløgd av áarfloyminum í september. Tann nýggja brúgvin líkist tí gomlu, og hóskar stak væl inn í umhvørvið í viðarlundini.

Efir røðuna handaði borgarstjórin flokkinum ein kekk áljóðandi 5.000 krónur, og tey vóru sjálvandi sera fegin um hesa samsýning. Sum tann eini næmingurin segði: »Ikki so galið at fáa løn fyri skúlating, ha?«.

Eftir røðurnar bjóðaði Hans Hjalti øllum til sjálvtøkuborðið, sum Jákup Ziskason hevði lagt til rættis.

Á borðinum stóð pinnamatur, sodavatn og vín, so løtan fekk móti endanum dám av eini útferð av tí fínara slagnum.

# www.javnratt.fo væl vitjað

**Síðani heimasíðan hjá Javnstøðunevndini lat upp av nýggjum fyri hálvari aðru viku síðani, hava um 3000 fólk verið inni á síðuni og nógv hava eisini tikið lut í kjakinum og atkvøðugreiðsluni**

KVINNUVAL
*Turið Kjølbro*

Nýggja dagførda heimasíðan er liður í stríðnum hjá Javnstøðunevndini at fáa fleiri kvinnur valdar inn á ting, og at upplýsa og kunna um ójavnstøðuna í talinum av mannligum og kvinnuligum løgtingslimum. Greitt verður frá, hvønn týdning tað hevur fyri samfelagið, at kvinnur hava lítla politiska ávirkan og hvørjar orsøkirnar kunnu vera til, at so fáar kvinnur stilla upp og verða valdar inn á ting.

- Tað hevur týdning, at fleiri kvinnur verða valdar inn á ting. Eitt vælvirkandi samfelag krevur aktivar samfelagsborgarar, sum gera sína ávirkan galdandi, tá raðfestingar verða gjørdar og avgerðir tiknar. Ikki bert tey gomlu, sjúku og veiku hava fyri neyðini at verða aktivir borgarar, um tey skulu vænta at fáa áhugamál teirra rímuliga raðfest. Eisini tey ungu mugu vísa á sín tørv.

- Og hvussu við kvinnunum? Umframt at tær eru bæði ungar og gamlar, sterkar ella veikar, so telja tær helmingin av landsins borgarum. Er tað annað enn ein sjálvfylgja at tær, júst tí tær eru kvinnur oftast raðfesta øðrvísi enn menninir? Kann samfelagið ella tann politiski leikpallurin yvirhøvur vera hesar røddir fyriuttan, sigur Turið Debes Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini, sum vónar, at veljararnir í ár stuðla kvinnuligum valevnum, soleiðis at 2002 gerst árið, har kvinnurnar sita á 25 prosent av Løgtingssessunum og harvið fáa møguleika at gera seg galdandi á politiska leikpallinum og virka fyri einum meiri fjølbroyttum virksemi á tingi.



*- Umframt at kvinnurnar eru bæði ungar og gamlar, sterkar ella veikar, so telja tær helmingin av landsins borgarum. Er tað annað enn ein sjálvfylgja at tær, júst tí tær eru kvinnur oftast raðfesta øðrvísi enn menninir, sigur Turið Debes Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini*

Í nýggjari grein á heimasíðuna svarar hon spurninginum, nógv hava sett, nevniliga hví tað er neyðugt við einum serligum átaki fyri at fáa fólk at velja kvinnur.

- Viðmerkingarnar, javnstøðunevndin hevur fingið, geva ein part av svarinum. Blokeringar, ivasemi og aggressiónir, tí kvinnurnar nú vilja nakað annað enn tað, sum hevur verið væntað av teimum, og sum vit eru von við. Tann politiski leikpallurin hevur ikki júst verið teirra. Og tað er ikki ein sjálvfylgja at lata seg umboða av eini kvinnu á Føroya Løgtingi. Kynsbrillurnar forða her fyri útsýninum, sigur Turið Debes Hentze millum annað.

## Úr innihaldinum

Annika Wardum Joensen er sett at samskipa heimasíðuna. Á síðuni er ein rúgva av spennandi og aktuellum tilfari, ið alt nemur við kvinnupolitiskar spurningar og mál, ið viðkoma kvinnum. Hvørja viku verða kvinnuligir politikarar lýstir, og hesar greiðar frá tankum og ætlanum viðvíkjandi javnstøðu. Fimm fólk siga frá teirra meting um ymiskar spurningar viðvíkjandi javnstøðu, hesa vikuna, hví summi fólk ikki vilja atkvøða fyri einari kvinnu.

Fesku greinirnar á heimasíðuna hesa vikuna eru tríggjar. Helena Dam á Neystabø, tingkvinna, sigur frá um arbeiðsháttin í tinginum, Malan Johansen, búskaparfrøðingur, hugleiðir rundan um spurningin, um hon hevði broytt nakað, um hon kom á ting, og Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur, viðger spurningin, hvønn týdning tað hevur fyri samfelagið, at kvinnur hava lítla politiska ávirkan. Í farnu viku viðgjørdi Rói Patursson, heimsspekingur, spurningin, um kvinnur skulu vera uppi í politikki, Bjørt Samuelsen, tíðindakvinna, setur spurnartekin við, hví kvinnur siga nei at verða uppstillaðar, og Dagny Joensen, tíðindakvinna, hugleiðir um spurningin, um kvinnuligu politikararnir hoyrast. Í komandi viku eru aftur nýggjar áhugaverdar greinir at lesa.

Hvørja viku skrivar forkvinna í Javnstøðunevndini um kvinnur og politikk, og heimasíðuvitjandi svara spurninginum, um fleiri kvinnur áttu at havt sæti á tingi,

Slóðir eru til danskar greinar og annað tilfar um javnstøðu.

Í morgin, tað vil siga í hósdagsblaðnum, fer Sosialurin undir eina greinarøð, vit rópa Kvinnuval. Fyrsta greinin er samrøða við Anniku Wardum Joensen, samskipara av heimasíðuni hjá Javnstøðunevndini, sum eisini hevur royndir sum stjóri. Síðani koma seks greinir, ein í hvørjum blaði til valið, har kvinnulig valevni umboðandi allar seks flokkarnar, siga frá, eitt nú, um tær ætla at virka fyri størri javnstøðu í samfelagnum. Seinasta greinin, sum kemur sjálvan valdagin, er samrøða við Helenu Dam á Neystabø, tingkvinnu.



TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Kunngerð

Kunngjørt verður, at tíðaravmerkingin á parkeringsøkinum á Bursatanga verður flutt úr 4 tímum niður í 1 tíma gerandisdagar kl. 9-18. Broytingin kemur í gildi 1. mai 2002

Tórshavnar kommuna og Politistøðin

SNARSKIVAN

www.johandahl.net



Johan Dahl
Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy

Hús í Íslandi til leigu
Gisting í Rangárþingi
HELLIRINN ÆGISSÍÐU v/HELLU



Hús: S:8683677
76m², 4 herb., eldhúsaðstaða.
25 m², eldhúsaðstaða.
Sími: 487 5871

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. 2400, Norðoya Sparikassi, 700 Klaksvík.

Viðtøkur broyttar: 31.12.2001 og 22.02.2002.
Ábyrgdarpeningurin er tann 31. december 2001 kr. 2.817.000,00

Skráseting Føroya tann 15. apríl 2002

Kristin Balle

HUGNALØTA

verður í HÆDDINI í Saltangará

Í kvøld, MIKUKVØLDIÐ 17. APRÍL 2002 KL. 20-22

Jens Marni Hansen úr Kollafirði spælir og syngur

Kaffi, te, smyrjibreyð og køkur verða at fáa

Valevni Javnaðarfloksins verða við á hugnaløtuni og høvið verður at skifta orð við tey

Øll eru hjartalig vælkomin

Eysturoyar Javnaðarfelag

Lærupláss hjá Rasmussen og Weihe

**Vit kunnu ikki lova tær pláss á landsliðnum…**

… men eftir summarfrítíðina hava vit tvey lærupláss tøk. Og hjá R&W hava vit eisini **eitt dugnaligt og væl samanspælt lið.**

At grannskoða varð fyrr mangan hildið at vera eitt keðiligt arbeiði, har ein bara sat og stardi at tølum. Í dag virkar grannskoðarin ofta sum ráðgevi, og við sínum heildarinnliti í viðurskifti kundans kann hann veita virðisskapandi ráðgeving.

Umframt at grannskoða skal grannskoðarin í dag eisini kunna geva ráð um **fígging, management, skatt, roknskap o.a.** Hetta krevur bæði praktiska og teoretiska útbúgving. Tað er eisini neyðugt at hava góðan kunnleika bæði til vinnulívið sum heild og alment virksemi og stovnar.

Jú, grannskoðan er í roynd og veru **spennandi,** og ein útbúgving hjá okkum gevur sera **góðar framtíðarmøguleikar.**

Vit bjóða tær eitt lærupláss, har tú fyrst kanst lesa HD. Tað merkir, at tú vinnur pening, samstundis sum tú fært eina hægri útbúgving.

Ætlar tú tær víðari eftir HD, **eru møguleikarnir fleiri.** Tú kanst t.d. lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi, samstundis sum tú arbeiðir hjá okkum. Tú kanst eisini lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark - tú kanst fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark.





Aftan á cand. merc. aud. er møguleiki at gerast statsautoriseraður grannskoðari. Hevur tú **vilja og evni,** stuðla vit tær sjálvsagt í at fullføra tað, tú setir tær fyri.

Vit vænta, at tú hevur tikið ella tekur students-, HF- ella HH-prógv í summar, og at tú ert áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving. Tú hevur hug at sameina eina teoretiska útbúgving við eina praktiska útbúgving. Eisini heldur tú tað vera spennandi at sleppa **at virka í vinnulívinum.**

Størvini skulu setast eftir summarfrítíðina, men longu nú kunnu vit gera eina setanaravtalu. Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen.

Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. apríl .

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Glaðsheyggi · Box 30 · FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 31 10 17 · Fax (+298) 31 10 18
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo · http://www.rasmussen.fo